GÍ-Skála 2-1 (0-0):

Skála mundi arga aftur

GÍ vann ein tepran sigur, tá Skála vitjaði, men við eitt sindur av hepni kundu gestirnir væl fingið í øllum førum annað stigið við heimaftur

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Sámal Joensen, sum her roynir seg við skoti, gjørdist bjargingarmaðurin hjá GÍ, tá hann um miðjan seinna hálvleik stútaði hornaspark í netið

Mynd: Jonhard Hammer

Hvørja ferð Skála fer á vøllin í ár, hava teir møguleika at seta nýtt innanhýsis met. Skála hevur nevnliga ongan tíð áður átt umboð í bestu deildini, og tí hava teir sjálvandi heldur ikki fingið stig í bestu deildini áður.

Í øðrum umfari skelkaðu teir meistararnar úr B36, tá hesir bert fingu annað stigið við sær av Skála, og 2. hvítusunnudag vitjaðu teir so hjá silvurvinnarunum í fjør, GÍ.

Stokkut hjá Súna

Fyrstu lítlu løtuna av dystinum vóru tað eisini favorittarnir á heimaliðnum, sum slerdu tónan an. Gøtumenn royndu at leggja trýst á liðið hjá Skála, men geistirnir vóru fyri tað mesta væl skipaðir, soleiðis at eingir málmøguleikar av týdningi ikomu.

Tað var eisini hampuliga skjótt, at trýstið frá gøtumonnunum dovnaði, og hetta tóktist eisini at hóva gestunum væl. Spakuliga royndu teir at flyta spælið longur niðan á mótstøðuhálvuna, og í einstøkum førum spurdust eisini málmøguleikar burturúr. Hin besta átti Kári Nielsen helst, tá hann breyt ígjøgnum í síðuni, men vinkulin gjørdist ov spískur, og Hallur Hansen fekk beint atsóknina út til hornaspark.

Annars hevði GÍ hesa ferð Súna Olsen á liðnum, eftir at hann er komin aftur úr yrkistilveruni í Hollandi. Hesa ferð gjørdist leiklutirin hjá honum tó heldur stokkutur. Fyrst fekk hann ein snudd í lærið, og tá hann nakað seinni brast saman við mótstøðumann noyddist hann av vøllinum at verða seymaður yvir eyganum.

Dánjal mundi avgjørt

Sum hálvleikurin leið, so var Skála kanska liðið, sum hevði betra spælið. Í øllum førum royndu teir at spæla sítt spæl, meðan lítið og einki tóktist ganga eftir vild møguleikar hjá gøtumonnunum.

Tí var tað alt annað enn óuppiborið, tá Skála stutt eftir steðgin legði seg á odda. Uppspæl úr verjuni endaði í høgra borði, har Alexandur Johansen var staddur. Hann sendi innfyri, og har eydnaðist Dánjali Hansen at troka seg fram um GÍ verjuna, og við fótinum beindi hann bóltin í málhornið, uttan at Hallur hevði nakran møguleika at verja fyri.

Málið fekk nakað av ferð á gøtumenninar, men tað var kortini um reppið, at Dánjal Hansen avgjørdi dystin til fyrimuns fyri Skála. Stutt eftir málið var hann enn einaferð fyrstur á einum innleggi, men hesa ferð brast bólturin upp undir tvørtræið og niður á málstrikuna, og so kundu gøtumenn rudda vandan burtur.

Tað hóvaði sjálvandi gøtumonnum sera illa, at nýggja liðið í deildini soleiðis skuldi arga. Ikki minst mundi tað kennast tungt hjá Sámali Joensen, sum dagliga starvast á Skála, men tjúgu minuttir fyri leiklok var hann maðurin, sum bródliga sendi GÍ á sigurskós.

Eftir at teir í eina góðu løtu høvdu lagt trýst oman móti Skála-málinum, hevði GÍ enn einaferð vunnið sær hornaspark. Hesa ferð var Sámal hægstur, og hann stútaði bóltin upp í málhornið.

Málið setti enn meira ferð á GÍ, og smáar fimm minuttir eftir at teir høvdu javnað, lá bólturin aftur í Skála málinum. Hesa ferð var talan um sjálvmál, men Bent Durhuus hevði lítið annað at gera, tá bólturin var sendur hart innfyri. Sámal Joensen stóð púra leysur aftan fyri verjuleikaran, men tá hannskuldi beina bóltin burtur, var Bent somikið óheppin, at hann stútaði hann í egið mál.

Fara at arga

Hetta gjørdist eisini avgerandi málið í dystinum, og tað var ikki sørt, at uppflytararnir iðraðu seg eftir dystin. Í øllum førum hildu teir seg hava uppiborið annað stigið, og var skotið hjá Dánjali á træverkið bara ein sentimetur neyvari, kundi talan eins væl verið um trý stig.

Samanumtikið var alt hetta tó akkurát ov lítið hjá Skála, men tað er tó einki at ivast í, at teir fara at arga fleiri av hinum liðunum í deildini. Næsti møguleikin verður stevnudystur móti VB, og við hópin av heimaáskoðarum til tann dystin, er einki at ivast í, at Skála menn enn eina ferð fara at seta nøsina upp eftir stigum.

Gøtumenn harafturímóti kundu fegnast um, at drúgvu royndir teirra enn einaferð høvdu tryggjað teimum trý stig. Teir munnu tó vera fullvæl vitandi um, at teir skulu finna spæl fram, um nakar hugsingur skal vera um stig, tá teir komandi vikuskifti vitja oddaliðið í Gundadali. Til ta tíð vóna teir eisini, at Magni Jarnskor, Súni Fríði Johannesen og Krzysotf Popczynski er komnir í betri venjingarstøðu, soleiðis at meira bit verður í álopspartinum á liðnum.

Dysturin í tølum

GÍ-Skála 2-1 (0-0)
0-1: Dánjal Hansen, 57.
1-1: Sámal Joensen, 70.
2-1: Sjálvmál, 75.

Dómari: Suni Johannesen

GÍ: Hallur Hansen – Hans Pauli Petersen, Bartal Eliasen, Leivur Hansen, Áslakur R. Petersen – Magni Jarnskor, Sámal Joensen, Súni Olsen, Zdzislaw Janek – Krzystof Popczynski, Súni Fríði Johannesen

Skála: Eugen Voda – Ronni Hansen, Rúni Rasmussen, Áki L. Petersen, Bent Durhuus – Marius Joensen, Kári Nielsen, Pauli Hansen, Arnold Berg – Alexandur Johansen, Dánjal Hansen

ÍF – B36 1-3 (0-2):

Óvæntaður sigur

B36 fekk ein óvæntaðan sigur í Fuglafirði móti einum sera spøkum heimaliði, og hetta var annar ósigurin á rað hjá ÍF

2. DEILD
Jákup Mørk

Fuglfirðingar fingu annan ósigurin á rað, tá B36 vitjaði, og longu nú tykist dreymurin um uppflyting at kámast

Mynd: Jonhard Hammer

Tað var B36, sum setti seg á dystin frá byrjan av, tí longu eftir fimtan minuttir hevði útiliðið lagt seg framum við tveimum málum. Hetta var ein dyggur smeitur fyri ÍF, sum ongantíð megnaði at reisa seg eftir hetta.

Fyrra málið skeyt Bergur Midjord eftir gott uppspæl í høgru síðu. Carl Høgnesen verður sendur avstað í høgra borði, og hann sleppur aftur til baklinjuna. Síðani sendir hann bóltin útfrá til Berg, sum langar til frá brotssparksblettinum, og bólturin strýkur framvið málverjanum, ið ikki hevði nakran møguleika at bjarga.

Hetta kom ógvuliga dátt við hjá fuglfirðingum, og bert fáar minuttir seinni fingu teir enn ein frammaná.

Ein verjuleikari hjá ÍF hevur bóltin á egnari hálvu. Hann skal senda ein langan bólt frameftir vøllinum, men hann rakar í ryggin á Tórálvi Poulsen, sum síðani setir beina kós móti málinum. Hann sendir framvið málverjanum í stongina og inn.

Bert fimtan minuttir á klokkuni, og B36 var longu frammanfyri við tveimum málum. ÍF royndi eftir hetta at bíta frá sær, og onkuntíð gjørdist tað vandamikið, men B36-verjan megnaði at halda fast um leiðsluna.

ÍF hevði bóltin meira enn B36 restina av dystinum, men alt ov lítið kom burturúr leikligu yvirvágini. Høgni á Lakjuni hevði kanska tann besta málmøguleikan hjá ÍF. Bólturin datt fyri føturnar á honum, tá hann var staddur beint uttanfyri málteigin, men René í málinum hevði eina framúr góða bjarging.

Spakur hálvleikur

Í seinna hálvleiki skuldi ÍF veruliga taka sær um reiggj, um nakað skuldi fáast burturúr hesum dystinum. Seinni hálvleikur var tó ikki tann stóra fótbóltsliga upplivingin. ÍF royndi at trýsta, men heimaliðið hevði tað ógvuliga torført við at fáa gongd á álopsspælið. Tað var ógvuliga sjáldan, at René Tórgard í B36-málinum noyddist at toyggja seg.

Tað var tó B36, sum økti til 3-0. Eitt langt fríspark verður sent úr høgru síðu, og Tórálvur Poulsen leggur bóltin niður í brotsteigin. Hann langar til, og so var staðan 3-0 til B36. Dysturin var nú í roynd og veru avgjørdur, men ÍF fekk pynta um úrslitið, tá Høgni Zachariasen sendi eitt fríspark beinleiðis í netið. Eitt sera vakurt mál.

Eftir at ÍF fekk eina dreymabyrjan við einum 8-1 sigri á KÍ, er liðið steðgað upp. Hetta var annar ósigurin á rað, og ÍF tóktist ikki sum eitt lið, ið hevur kós móti 1. deild.

Dysturin í tølum

ÍF – B36 1-3 (0-2)
0-1: Bergur Midjord
0-2: Tórálvur Poulsen
0-3: Tórálvur Poulsen
1-3: Høgni Zachariasen

B68-EB-Streymur 2-1 (1-0):

B68 gloymdi at binda um

Eftir trilvandi fyrra umfar hevði heimaliðið so mikið gott tak á stóran part av seinna umfarinum, at tað átti at verið púra óneyðugt, at ivi skuldi verða um, hvar stigini fóru at enda

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Fyri tað mesta vóru tað toftamenn, sum vóru omaná, men seinastu løtuna trýstu gestirnir fyri javnleikin, og nakrar spentar støður tóku seg upp

Mynd: Finnur Justinussen

Í góðveðrinum á Svangaskarði 2. hvítusunnudag var fótbóltsspælið einki at rópa hurrá fyri. Serliga í 1. hálvleiki var spælið – ikki minst hjá heimaliðnum – sera illa skipað. Bóltførleikin var eyðsýniliga lítið neyvur, sendingarnar vóru ofta skeivar, og spælararnir fluttu seg so mikið fyri hvørjum øðrum, at hann við bóltinum nógv oftast bara hevði ein og viðhvørt ongan upplagdan møguleika.

B68 vann 2–1, og tað var einki at siga til sigurin. Fyrra partin av seinna umfarinum vóru teir greitt omaná. Møguleikar stóðust undir málinum, eftir uppspæl í báðum borðunum. Eftir flata innleggið frá John Hera Dam úr vinstru og útfrá, kom ein verjuspælari ímillum, áðrenn Jann Ingi Petersen kundi skjóta, og John Heri sendi úr góðari støðu uppum við kalda høgra beininum, tá Arnold Joensen hevði lagt út frá baklinjuni í høgru.

Gylti møguleikin

EB/Streymur legði bragdliga fyri, og stóran part av fyrra umfarinum vóru tað gestirnir, sum spældu fyrstu violin mitt á miðvøllinum. Ronnie Samuelsen var besti sentrali miðvallarin, og onkra ferðina var um reppið, at hann spældi Sorin Anghel leysan.

Rumenski álopsspælarin fekk gyltan møguleika, tá fimm minuttir vóru farnir. Eitt sindur frammanfyri miðstrikuna kom hann ímillum ónevyt B68 uppspæl, hann sneiddi framvið tveimum, Hans Fróði Hansen var óheppin og datt, og tá Sorin Anghel kom á brotsteigarmarkið, smekkaði hann til, og bólturin fór langt omanfyri.

B68 fólkið dróg andan lættari, og gestirnir á og kring vøllin iðraðu seg um, at tað ikki eydnaðist at fáa mál og harvið at broyta fyritreytirnar fyri dystinum fullkomuliga.

Øssur fyri seg sjálvan

Øssur Hansen var í vinstra álopsborði hjá B68. Hann var nógv tann eyðsýndasti maðurin á vøllinum. Hann hevði bóltførleikan, sum teir flestu restaðu, hann hevði sjálvsálit, og hann hevði dirvi og tyngdina, sum skal til, tá ein og tveir spælarar skulu leggjast afturum.

Øssur skoraði til 1–0 upp á fyrsta møguleikan, sum fall heimaliðnum í lut – um tað bar til at kalla tað fyri møguleika. Tíggju minuttir vóru farnir, tá Jan Petersen, sum hesa ferð var aftastur í trímansverju, legði fríspark úr høgru og innfyri brotsteigin. Anders Nygaard sneiddi við høvdinum í brotsteigin, og so kiksaði hjá EB/Streymi. Knút Vesturtún, Hallur Jacobsen og Christian Calrsson megnaðu fyri tað mesta at halda B68 frá fatinum, men hesa ferð stóðu teir saman við hinum og hugdu at, meðan Øssur Hansen tamdi og mitt fyri málinum potaði framvið sakarleysa og annars trygga Gunnari á Steig.

Kanska kundi roknast við, at málið fór at loysa upp, so heimaliðið fór at spæla meiri frígjørt, men tað gjørdu teir ikki. Hóast Fróði Benjaminsen ikki enn á ár hevur verið á støðinum, sum í fjør gjørdi, at hann varð natúrligt var til ársins spælara, so var tað týðuligt, at hann var leikbannaður hesa ferð.

Gloymdu kuldan

Eftir steðgin var heimaliðið omaná. Bogi Petersen stóð seg væl, tá hann kom inn á miðvøllin, og hann var við í uppspælinum, tá B68 miðskeiðis í 2. hálvleiki økti til 2–0. Bogi spældi Arnold Joensen í høgru, Arnold sendi flatt í brotsteigin, Jann Ingi Petersen leyp upp um bóltin, og so var Anders Nygaard á rætta staðnum røttu løtuna. Úr heilt stuttari fjarstøðu stýrdi hann bóltinum í málið.

So var tað, at B68 hevði yvirvág og kundi havt skorað fleiri mál. Tað gjørdu teir ikki. Sorin Anghel var farin av vøllinum, tá EB/Streymur fimm minuttir undan leikloki minkaði um munin. Eftir uppspæl í høgru endaði bólturin hjá liðformanninum Ronnie Samuelsen. Bólturin stiklaði eina ferð, og so smekkaði Ronnie til úr 20 metrum. Klassamálverjin Michal Kokoszanek tveitti seg í fullari longd, men tað sang í netinum, og so kendist tað, sum um toftamenninir vóru eitt sindur strongdir. Góðveðrið var avloyst av gráum og ráðum veðri, men báðu megin vøllin vóru áskoðararnir so mikið spentir, at teir ikki tóktust leggja kuldan til merkis.

Kortini gjørdist tað ongantíð rættuliga vandamikið.

Hóast talan á ongan hátt var um ófantaligt spæl – tað var dysturin fyri tað mesta ov dovin til – so var gula kortið fimm ferðir á lofti. Tað var hugvekjandi. Mitt í 2. hálvleiki kom Fróðin Ziskason fyri fyrstu ferð inn á B68 liðið. Hann varð skiftur inn á ytsta miðvallarplássið í vinstru og ikki mitt á miðvøllin, har hann heilt víst hevði gjørt størri nyttu, tá tað skuldi stríðast fyri stigunum.

Dysturin í tølum

B68-EB/Streymur 2-1 (1-0)
1-0: Øssur Hansen 12
2-0: Andreas Nygaard 67
2-1: Ronnie Samuelsen 84

Dómari: Eiler Rasmussen

B68: Michal Kokoszanek – Hans Fróði Hansen, Jan Petersen, Messias Perreira – Marlon Joreg, Jann Ingi Petersen, Oleif Joensen, John Heri Dam – Arnold Joensen, Anders Nygaard, Øssur Hansen

EB/Streymur: Gunnar á Steig – Hallur Jacobsen, Knút Vesturtún, Christian Carlsson, Alfred Jacobsen – Marni Djurhuus, Jákup Martin Joensen, Ronnie Samuelsen, Hans Pauli Samuelsen – Andrzej Pacek, Sorin Anghel

VB-NSÍ 1-0 (1-0):

VB á stigatalvuna

VB fekk trý týdningarmikil stig í dystinum móti NSÍ leygardagin í Vági. Sigurin merkir, at VB nú er komið á stigatalvuna, meðan NSÍ framvegis hevur síni fyrstu stig til góðar

2. DEILD
Bjartur Nolsøe

Tað var nógvur vindur í Vági henda dagin, og var tað VB sum spældi undan í fyrra hálvleiki. Vindurin darvaði spælinum nógv, og ofta vórðu bóltarnir ov langir og fóru út av baklinjuni. Men sum fyrri hálvleikur gekk, fekk VB meiri stýr á spælinum, og fingu lagt trýst á NSÍ.

Tá okkurt um korter var farið, kundu vágbingar komið á odda, tá Sigmund Mikkelsen gjørdist púra leysur við málmanninum hjá NSÍ. Men hann skeyt bóltin við síðuna av málinum.

Einasta málið í dystinum kom aftaná 20 minuttir, tá Símun Samuelsen kom at standa fríur inni í brotsteiginum hjá NSÍ, og kundi lætt skjóta framvið málmanninum til 1-0.

Hóast NSÍ hevði bóltin nógv henda fyrra hálvleikin, gjørdist teir ongantíð vandamiklir. Teir komu bert fram til hálvar málmøguleikar, og varð tað sum oftast Mortan Hansen sum lá framvið.

VB harafturímóti kundi fingið okkurt málið aftrat, millum annað høvdu teir skot á stongina.

VB var betri

Í seinna hálvleiki fekk NSÍ nógva vindinn í ryggin. Spælið bleiv eisini flutt longur oman á VB-hálvuna. Nógvar royndir vórðu móti VB-málinum, men fóru tær sum oftast við síðuna av. Sjálvt um NSÍ hevði vindin í ryggin, fingu teir ongantíð tað flótandi spælið fram. Heldur ikki komu runavíkingar fram til tær stóru upplagdu málmøguleikarnar, tí tann seinasta avleveringin ongantíð var neyv nokk.

Sum tíðin gekk og NSÍ ikki kundi hótta VB, fór luftin úr runavíkingum og VB tók yvir aftur. Seinnu helvt av seinna hálvleiki var tað VB sum var betra liðið.

Hóast mótvindin fingu vágbingar flutt spælið langt niðan á NSÍ-hálvuna, og komu teir eisini fram til rímuliga stórar málmøguleikar.

Tann størsta fingu teir í seinasta minuttinum, tá tveir spælarar komu einsamallir móti NSÍ-málmanninum, men onkursvegna fingu teir skotið bóltin ov langt frá sær, so málmaðurin fekk hann.

Samanumtikið ein uppiborin sigur til VB, og kunnu teir gleðast yvir fyrstu stigini hetta kappingarárið.

Dysturin í tølum:

VB-NSÍ 1-0(1-0)
1-0: Símun Samuelsen